Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

## Starv í fíggjarumsitingini

Landsbankin søkir eftir einum fólki til fíggjarumsitingina at byrja skjótast gjørligt

**Arbeiðsuppgávur:**
- Fíggjarumsiting
- Rapportering
- Íløgurøkt
- Aðrar fyrisitingaruppgávur

Uppgávurnar í bankanum eru býttar í arbeiðsøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar breiðar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í verkætlanum, eins og tað er skiftandi.

**Førleiki:**
Praktiskar royndir og viðkomandi útbúgving eru neyðugar.

**Løn:**
Eftir avtalu við støði í sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**Tíðarfreist o.a.:**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra, tel 308126 (sigurd@landsbank.fo) ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra, tel 318122 (jem@landsbank.fo) um fleiri upplýsingar.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir sendast landsbankanum áðrenn 28.04.2008 kl. 16.00.

Landsbanki Føroya er bankasamband landsins. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar. Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna www.landsbank.fo

Müllers Hús | Gongin | Postrúm 229 | FO-110 Tórshavn
E-postur: landsbank@landsbank.fo | www.landsbank.fo






(+45) 236.781.66 ella (+45) 236.781.65
www.hammershus.fo - torfinnur@email.fo



zarepta

## Familjulega fyri brekað
## So ymisk og tó...

Hjartaliga vælkomin á legu í Zarepta í døgunum 17.-20. apríl 2008 - Legan er ætlað øllum, ið bera brek og familjum teirra.

**Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, er millum annað:**

- andakt
- sangur
- fyrilestrar
- pallborð
- samtalubólkar
- kvøldsøga
- tónleikur
- leikvenjing
- fimleikur
- ríðing
- svimjing
- túrar
- spæl úti og inni
- ymisk ítriv
- video

**Fyrilestrar:**
***Fríggjadagin 18. Apríl***
kl. 10.00 At fáa diagnosu, og hvat so
Óli Wolles
kl. 15.30 Omma hjá brekaðum barni
Jona Nielsen
kl. 20.00 Pedagogiskir førleikar og menningartarnað
Marjun Højgaard o.o.

***Leygardagin 19. apríl***
kl. 14.00 Autisma – Ein dagligdagur fyrr og nú
Karl Martin Samuelsen
kl. 20.30 Hjartað og heilsa
Heðin Thomsen

**Havið hettar við**
Dýnuvár, koddavár og lak
Um tú verður við á túrum og svimjing – heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistúvlar og svimjiklæði.

**Kostnaður fyri leguna:**

| | |
|---|---|
| Børn 0-5 ár | ***100 kr.*** |
| Børn 6-14 ár | ***225 kr.*** |
| Vaskin | ***400 kr.*** |

Konto 6460-156.666.2– havi kvittan við vestur

Húsið er opið hóskvøldið kl. 18.00
Náttturði verður boðin frá kl. 19.30
Legan verður sett kl. 21.00

Ring til ein av undirritaðu, um spurningar eru í samband við leguna.

**Norðoyggjar**
Jógvan Tróndheim, tlf. 456822

**Suðuroy**
Majbritt West, tlf. 375284 / 575284

**Annars**
Samly Reinert, tlf. 318720 / 518720

**Tilmelding er** hjá Annu Mørkøre, tlf. 315280 ella Elisabeth Mortensen, tlf. 317244
ella teldupost: elisabeth1502@hotmail.com,
í seinasta lagi **fríggjdagin 11. apríl.**



VENJINGARSKÚLIN

# VENJINGARSKÚLIN
handan Á 14 · Box 59 · FO-110 Tórshavn

## Fyribilsstarv sum varaskúlastjóri

Í sambandi við, at varaskúlastjórin fer í farloyvi, verður starvið sum varaskúlastjóri í Venjingarskúlanum lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2008 til 31. juli 2009.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni í skúlanum
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lærarаútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribilstænastu í Venjingarskúlanum. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokki 34.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/-ur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir** við ljósriti av prógvum og CV og møguligum viðmælum skulu verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er **28. apríl 2008 á middegi**.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petur Ova Petersen, skúlastjóra á telefon 213502 ella 301529.

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 440 næmingar í 19 flokkum, og her koma at starvast 45 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi : 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum : 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.